# Kim Wilde skal fáa leygarkvøldið upp á kók

**- Føroyingum hava altíð dámt Kim Wilde sera væl, og tí ivast vit ikki í, at fólk veruliga kunnu syngja við, tá ið hon fer á pallin á Summar Festivalinum, sigur Steintór Rasmussen, ein av fyrireikarunum av festivalinum**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosiialurin.fo*

Týsmorgunin hevði Summar Festivalurin tíðindafund á nýggju deildini hjá Norðoya Sparikassa í Havn. Høvið var, at seinna útlendska høvuðsnavnið á festivalinum skuldi kunngerast, og tað var sum teimum flestu kunnugt Kim Wilde.

Fyrireikararnir av Summar Festivalinum eru sera fegnir um, at tað hevur eydnast at fingið Kim Wilde at spæla á festivalinum í ár.

- Vit hava Scorpions á palli fríggjakvøld, og tað er ein heimskendur rockbólkur, sum er nokk so maskulinur. Leygarkvøld verður Kim Wilde so høvuðsnavn, og hon stendur fyri tí meira popputa og feminina. Tað passar sera væl til Summar Festivalin í ár, segði Steintór Rasmussen, sum er ein av fyrireikarunum, á tíðindafundinum týsdagin.

- Tað skulu kendir sangir og góðir tónleikarar til fyri at lyfta eitt leygarkvøld á Summar Festivalinum, og tað fara Kim Wilde og hennara bólkur at klára. Kim Wilde hevur verið ovast á popptindum í USA og í Europa, hon hevur nógvar kendar sangir, og hon er í góðum formi, nú hon hevur verið á konsertferð og givið nýggja fløgu út.

## Stóru nøvnini upp á pláss

Kim Wilde kom av álvara fram í 1981 við sanginum Kids In America, og gjøgnum øll 80'ini skrivaði, sang og útgav hon popphitt, sum kom ovast á hitlistar í Europa og USA. Millum kendastu sangirnar hjá henni eru You Came, Kids In America, You Keep Me Hangin' On, Cambodia og Chequered Love.



- Føroyingum hevur altíð dámt Kim Wilde sera væl,

Mentamálaráðið
Fólkaskúladeildin

EINALÆRARI Í HÚSAVÍKAR/DALS SKÚLA

sansir.fo

**Starvið sum einalærari í Húsavíkar/Dals skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2007.**

**Um starvið**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum. Í hesum skúlaári eru fimm næmingar í Húsavíkar/Dals Skúla. Starvið er fulltíðarstarv.

**Søkt verður eftir einalærara, sum:**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- skal skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- hevur hugsjónir um skúlamenning, og hvussu hon verður sett í verk.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Húsavíkar/Dals skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi. Starvið verður lønt í lønarflokkunum 21.2, 23.2, 23.3, 23.4, 25.4, 27.4 og 30.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag um, hvussu lærarastørv verða flokkað og lønt.

**Umsóknir**
Umsóknirnar skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í **seinasta lagi 8. mai 2007 kl. 12.00.**

Umsóknin verður stílað til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella til t-post: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara **www.mmr.fo**.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.

Keypssamtøkan í Hoyvík

FK í Hoyvík sóknast eftir

***Fólki til kioskina***

at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðstíðin verður frá 9.00 til 13.30 mánadag til fríggjadag og annanhvønn leygardag.

Løn:
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Bent Lundsgaard, tel 214016

Skrivlig umsókn skal, í seinasta lagi leygardagin 12. mai, sendast til

FK Hoyvík
Brekkutúni 9
FO 188 Hoyvík
att: Bent Lundsgaard

fk

Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir

LÆRARUM

at undirvísa á HH og FHS á Kambsdali frá 1. august 2007.

**Les meira á www.fhk.fo**

VASTI 459010

FØROYA HANDILSSKÚLI
Føroya Handilsskúli á Kambsdali | Kamsdalur | FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 444900 | www.fhk.fo